VIÐMERKINGAR

# Frí fosturtøka

**Rakul í Gerðinum**
*Trongisvágur*

Er tað ikki í veruleikanum eitt fantastiskt tilboð, um fosturtøku, føroyskar kvinnur, hava fingið, frá teimum donsku, spyr Øssur Winthereig í kjaksendingini týskvøldið 19.10

Jú, avgjørt, er mítt svar til spurningin. Tað var eisini upp á tíðina, onkur miðil endiliga tók spurningin upp, ístaðin fyri, bara at endurgeva meiningarnar hjá føroyskum politikarum, ið eru ímóti tilboðnum.

Tað, at danskar kvinnur, og ein danskur politikari, eru komin við uppskotinum um, at føroyskar kvinnur skulu fáa stuðul úr Danmark, til at fáa fría fosturtøku framda har, hevur fylt alt ov nógv í tíðindaflutninginum her heima. Nú kunnu vit endiliga fáa eitt skilagott kjak í lag um fría fosturtøku, sum tað eru fleiri føroyingar, eisini politikarar, ið eru fyri.

Tað kunnu vera so ótrúliga nógvar orsøkir til, at ein kvinna velur fosturtøku. Ein orsøk eigur ikki við lóg, at vera betri enn ein onnur, sum til dømis, at lívið hjá kvinnuni er í vanda. Tá ein kvinna verður við barn, uttan at vilja tað, líkamikið, hvussu tað er hent, so er tað ikki mín ella tín, men hennara egna moralska hugsan, ið eigur at avgera,um hon skal gjøgnumførða graviditetin ella ikki. Tað er ongin annar, enn tann einstaka kvinnan, sum í síðsta enda eigur at gera upp við seg sjálva, um fosturtøka er rætta loysnin fyri hana ella ikki. Tí er frí fosturtøka tað einasta rætta fyri føroyskar kvinnur, eins og fyri allar heimsins kvinnur. Frí fosturtøka merkir ikki, at tað verða fleiri fosturtøkur framdar. Tað merkir bert, at tær fosturtøkur, ið verða framdar, fara fram undir virðiligum umstøðum. Harafturat átti tað, at verið ein óheftur stovnur, ið kundi ráðgivið kvinnum í slíkari støðu, uttan at royna at yvirtala tær til aðra av loysnunum, sum eisini var nevnt í kjaksendingini hjá SvF.

Øll eru vit helst samd um, at tað besta hevði verið, um ongin fosturtøka varð framd, men við verandi fosturtøkulóg, ella einum fosturtøkubanni, ger man støðuna verri fyri tey, ið eru blivin foreldur, uttan at ynskja tað sjálvi, og teirra børn.

# Viðmerking til kjakið um fosturtøku

**Bárður á Lakjuni**
*Leirvík*

Ja, so kyknaði kjakið um fría fosturtøku í Føroyum enn einaferð - hesaferð við 'góðari' hjálp niðan úr Danamørk. Eg havi stóran áhuga fyri hesum - hetta er jú eitt ómetaliga týdningarmikið og grundleggjandi etiskt/moralskt evni - og eg havi tískil eisini roynt at fylgt kjakinum, so frægt sum eg havi kunnað.

Sjálvur eri eg ikki fyri fosturtøku, og eg haldi tað vera óhugnaligt at síggja, hvussu fleiri av teimum - føroyingar sum danir - ið tala fyri hesi søk, orða seg, og hvussu tey annars føra sjónarmið síni fram. Við vøkrum orðum um 'frælsi og ábyrgd', og vælkendum 'svadum' sum, t.d., at 'kvinnan skal ráða yvir egnum kroppi' og haraftrat manipulerandi nýtslu av demokratinum, royna hesi menniskju av øllum alvi at rættvísgera hetta, at taka eitt fostur og gera enda á lívi tess.

Havi hesar síðstu dagarnar aftur og aftur spurt meg sjálvan, hvat tað er, ið 'drívur' hesi menniskju. Hesi, ið arbeiða so hart, at ein skuldi trúð, tað stóð um lív. Ja, summi eru so ómetaliga íðin, at tey enntá ynskja at savna inn pening til onnur, soleiðis at slík, ið ikki er so 'framkomin', 'siviliserað' og 'demokratisk', eisini skulu sleppa at eiga lut í 'grundleggjandi rættinum' at fáa 'fostrið fjernað'.

Havi so eisini roynt at hugsað um, hvørja veruliga áskoðan á og um lív í heilatikið, hesi menniskjuni hava, ið ynskja at fosturtøka skal verða fullkomiliga lóglig. Jú, nógv er sagt og skrivað millum ár og dag, og eisini hesar síðstu dagarnar er ymiskt komið fram - tó einki nýtt. Varð tó rættiliga skakkur av einum (og faktiskt fleiri) 'argumenti', eg hoyrdi frá Annitu á Fríðriksmørk - ið er fremsta politiska stríðskvinna fyri fríari fosturtøku í Føroyum - í 5'aranum hendan dagin. Hon segði nakað soleiðis..... "fosturtøka hevur eksisterað í so nógv, nógv hundrað ár undir óskipaðum/ólógligum forholdum...." Sum um hetta var nakað sum helst argument fyri at lógliggera fría fosturtøku!!! Grát mítt elskaða land, sigi eg bara!!! Kann mann so eisini siga, t.d.: Børn hava verið misnýtt í so mong ár nú - vit legalisera tað bara....??? Nei, sjálvsagt ikki!

Eg haldi, at kjakið frá teimum, ið eru fyri, er ómetaliga einsporað og merkt av ófatiligari egoismu. Tey seta einans kvinnuna og kropp hennara í fokus, og hugsa faktiskt als ikki um fosturið og kropp tess - um eg so má siga. Hvussu ber tað til, at hetta fullkomiliga hjálparleysa og veika verður so lítið virt? Og hvussu ber tað til, at tey menniskju, sum á einum 'fronti' berjast fyri betri livikorum hjá gomlum og veikum, sosialum javnrættindum...o.s.fr., eru so fulkomiliga hamskift, tá ið tað snýr seg um rættindini hja tí veikasata veika um yvirhøvur at sleppa at liva? Eg skilji hetta ikki! Er tað møguligt at skilja hetta? Er nakar sum helst høpi í slíkari avskeplaðari áskoðan? Er hetta ikki dupultmoralur av fyrstu skuffu?

Argumentini og prógvini fyri slíkari áskoðan mugu, ið hvussu er, vera ómetaliga sterk og haldgóð, tí annars kann ein ikki loyva sær at hava eina so totalt tvíbýtta og skizofrena støðu viðvíkjandi lívinum.

Tí ynski eg at seta ljóskastaran á nakrar grundleggjandi spurningar, sum øll eiga og skulu hugsa um:

**Nær byrjar lívið?**
Hetta er ómetaliga týdningarmikið at fáa at vita. Læknavísindin er mest sum á einum máli um (og hvat annað skuldi hon verið?), at lívið byrjar í tí løtuni, tá eggið verður gitið. Júst í tí løtuni, tá sáðkyknan og eggið renna saman, byrjar eitt nýtt og serstakt lív, sum heldur á at liva og mennast, um tað ikki av eini ella aðrari orsøk doyr - ella verður dripið. Tað, sum eg her sigi, er ikki bygt á 'fundamentalistiskt religiøst møsn og propaganda', men heilt einfalt á læknavísindaligar veruleikar.

Og skuldi minsti ivi verið um, hvørt lívið veruliga byrjar tá, átti so ikki ivin at komið fostrinum til góða? Meini so við: Um tú finnur onkran, og tú ivast í, hvørt viðkomandi er deyður ella livandi, hvat er tá rættast at gera? At royna at bjarga honum, ella bara ganga út frá, at hann er deyður og síðani fara tín veg? Sjálvsagt eigur minsti ivi at koma lívinum til góðar, tí annars siga vit: Hetta er møguliga ella møguliga ikki eitt barn, og tí er tað í lagi at taka lívið.....og tá eru vit, sum menniskju og samfelag í heila tikið, komin óhugnaliga langt út! Hvat verður tað næsta?

**Er bert talan um eitt lív?**
Tað verður av summum ført fram, at fostrið bert er ein partur av kvinnuni, og at tað ikki er øðrvísi enn, t.d., ein hond, bein, pirra...o.s.fr. Hetta er jú als ikki sannleikin - og so langt ífrá. Eins væl og mamman hevur fostrið sínar egnu og heilt serligu arvaeginleikar - sum eru heilt ólíkir teimum, ið mamman hevur - hetta er staðfest læknavísindaliga. Ja, hetta nýggja lívið hevur faktiskt heilt frá byrjan av allar arvaeginleikarnar, ið skulu til, fyri at tað skal kunna vaksa og mennast alla lívstíð sína.

Tað sæst 'á øllum brøgdum', at tá tosað verður um, hvørt talan er um eitt ella tvey lív, so er einki at ivast í: Talan er um tvey ymisk lív! Í USA, t.d., er ikki loyvi at avrætta eina kvinnu, ið er við barn. Hví? Jú, grundin er tann, at tað ófødda verður mett at vera serstakur skapningur, og tískil hevur tað rætt til at liva. Hvussu ber hetta til, kann ein spyrja? Er tað ikki frí fosturtøka har yviri? Jú! Skil tann, ið skilja kann! Hetta vísir bara enn eitt dømi um avskeplaða, skizofrena og dupultmoralska hugburðin, eg nevndi omanfyri.

**Hevur kvinnan rætt at ráða yvir egnum kroppi?**
Hetta, at kvinnan skal ráða yvir egnum kroppi, verður nýtt sum størsta og besta argumentið í stríðnum fyri fríari fosturtøku - men hvat merkir hesin setningurin í veruleikanum? Umleið 17000 skrásettar fosturtøkur verða framdar í Danmark um árið, eftir ynski frá kvinnum, ið 'ráða yvir egnum kroppi'. Havandi í huga, at umleið helvtin av hesum 17000 fostrum eru kvennkyn, so verða also á leið 8-9000 kvinnur frátiknar rættin til lívið - um árið! Ein og hvør kvinna hevur møguleikan at fáa allar sínar grundleggjandi tørvir nøktaðar, hóast hon er 'uppá vegin' - hví í allari víðu verð verður tað so hildið so hánt um rættin hjá ófødda gentubarninum - hvar er rópið um rættin til egnan kropp vorðið av??

Eg kann siga, at eg ráði yvir mínum egna kroppi, men gevur tað mær so rætt til, t.d., at sláa onkran niður ella at stjala við mínum hondum? Sjálvsagt ikki! Nei, spurningurin má vera hesin: Er tað, eg geri við mínum kroppi, til ampa fyri nakran annan - og tað er fosturtøka í allar hægstu grad - so er tað, eg geri, sjálvsagt ikki rætt - tað sigur seg sjálvt! Haldi eisini, at tað er sera áhugavert, at somu kvinnur, ið hava bart og enn berjast fyri javnstøðu millum kynini, kunnu loyva sær at taka allan rætt frá tí ófødda - hvar er logikkurin???

Mín áheitan skal tí vera, at politiski myndugleikin í landi okkara ongantíð fer at loyva fríari fosturtøku - tað má bara ikki henda. Rætturin, hvørt eitt menniskja skal sleppa at liva ella ei, kann ikki latast upp í hendurnar á einstøku kvinnuni, tí talan er ikki um privata søk - her er talan um at loyva einum menniskja at taka eitt annað mennskjalív, 'viss tað følist' neyðugt. Jú, hetta er veruliga 'the bottom line' - vit fáa eina lóg, sum loyvir, ja, loyvir einum menniskja at gera enda á einum øðrum - ófatiligt! Ófatiligt at nakar kann stríðast fyri slíkari søk, og so haraftrat nevna tað 'framkomið' og 'siviliserað'! Nei, heldur áttu vit øll - og politikararnir fyrst og fremst - at stríðst fyri rættinum til lívið, og heldur roynt at skapt góðar og virðiligar karmar - bæði fyri kvinnuna og barnið. Hetta er virðilig søk at stríðast fyri!

# »Ole sad på en knold og sang«

**Randi í Jógvanstovu**

*Viðmerking til grein í Dimmalætting 05.10.04*



Júvíst, Óli Breckmann, situr tú framvegis á »knodlinum« og trallar.

Trallar um, at skattalætti vil gera føroyska samfelagið til eitt betri samfelag fyri tey, sum dugnalig eru. Tí sambært tær eru tey, ið vísa á eitt vælferðarsamfelag við góðum pensiónum og plássi á ellis- og røktarheimum, bara við til at styggja fólk burtur hiðani.

Óli, góði, tú fert so dyggiliga skeivur.

At Føroyar eru lítlar og fjarskotnar, er eingin umbering fyri at forsøma fólkið. Tann skattur, vit rinda, eigur m.a. at fara til eitt gott heilsuverk, rímiligar pensiónir til øll, eitt trygt og tíðarhóskandi skúlaverk, góð ellisheim o.s.fr. Hesi tingini eiga at vera eitt tilboð til allar borgarar í landinum.

Tað lágskattasamfelag, Óli tosar um, vil á vælferðarøkinum bumba Føroyar aftur í 20'ini, tá ið bara tey vælbjargaðu vóru ment at klára seg. Hann hevur púra gloymt, ella eisini veit hann tað bara ikki, at tað eru ikki øll, sum forvinna tær upphæddir, hann fær á hvørjum ári. Nógv fólk í fiskivinnuni forvinna langt undir 200.000 um árið. Har er ikki nógv eftir at leggja til síðis til pensión, gjalda fyri læknahjálp, gjalda fyri pláss á ellisheimi, tá tann tíð kemur, gjalda fyri skúlagongd o.s.fr.

Føroyingur, búsettur júst á oynni Man, úttalaði seg fyri kortum til SVF: "Hetta er ikki eitt samfelag fyri tey, sum ikki klára seg sjálvi.

Tey, sum Óli kallar dugnalig, hava ikki brúk fyri vælferðarsamfelagnum ella tí, sum liggur í hesum hugtakinum. Tey kunnu nevniliga betala seg frá tí. Tað hava øll hini, og vit eru nógv í tali. So veitst tú tað.

Ikki so, eg skilji væl tína tankagongd. Tað er ivaleyst hart hjá tær at skula lata meir í skatti, enn tú heldur vera rímiligt. Hinvegin ivist eg ikki í, at tú forvinnur nóg mikið til "dagen og vejen" og væl tað, so tað er mín sannføring, at tað er ikki meir enn rætt og rímiligt, at tú gevur títt til vælferðarsamfelagið.

Eitt samfelag, har øll, ið eru ment, og sleppa at arbeiða, geva sítt ískoyti til frama fyri heildina, eigur at vera hægsta mál og ynski okkara.

Kærleiki og umsorgan eru lyklaorðini fyri eitt væl virkandi samfelag.

Kann henda, at tað "svíður sum svøllur", Óli Breckmann, men, "Pyt." Tak tað sum ein maður og gev títt íkast til føroyska vælferðarsamfelagið, tú hevur ráð, og eingin flísin fer av tær fyri tað. Smá í tí stóra høpinum og fjarskotin, Ja! tað eru vit, men vit eiga at vera ein tjóð við umsorgan fyri øllum.



VIÐMERKINGAR

# Frítíðarskúli til 2. flokk og systkinaavsláttur

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*
*valevni Javnaðarfloksins*
*www.lindenskov.com*



VAL04

Minnilutin í Tórshavnar býráði hevur enn einaferð ávirkað ætlanirnar fyri eitt komandi ár rætta vegin. Vit fingu meirilutan at ganga við til at víðka fríðtíðarskúlan til eisini at fevna um annan flokk. Men tíverri bar ikki til at fáa meirilutan til at taka allan annan flokk við.

Stórur tørvur hevur verið á fríðtíðarskúlanum. Næstan øll, sum hava fingið tilboðið í fyrsta flokki, hava tikið av tilboðnum og roknast kann við, at tað sama verður galdandi fyri annan flokk.

Í 2005 eru avsettar 1,8 milliónir krónur av til frítíðarskúla at byrja frá august. 1,8 millión er nóg mikið til meira enn helvtina av næmingunum í øðrum flokki. Tað var tað, vit fingu meirilutan at ganga við til hesa ferð. So mugu vit taka restina við í 2006 og so vóna, at vit kunnu fáa 3. flokk við sum frá líður.

Fyri meg hevur tað verið ótrúliga stuttligt at hava verið við til at broyta hugburðin til barnaansing og fríðtíðarskúla til tað, hann er í dag. Niðurstøðan má verða, at barnaansing og frítíðarskúlin økja um trivnaðin í Havnini, soleiðis at fólk støðast og vilja seta búgv í Havnini. Og vøkstur er neyðugur fyri at styrkja um Havnina.

Minnilutin setti eisini uppskot fram um systkinaavsláttur, so foreldur við fleiri børnum á dagstovni skulu fáa avsláttur. Hetta fingu vit ikki í gjøgnum, men samtykti uppskot um at hækka barnafrádráttin við 250 upp í 5.000 kr. fyri hvørt barnið.

Systkinaavsláttur er eitt mál, sum Javnaðarflokkurin hevur arbeitt fyri leingi. Vit vóna, at systkinaavslátturin kann fáast ígjøgnum innan alt ov leingi.

# Hvat við Leirvík?

**Jóhan Christiansen**

Nú dragnar úr kongum. Eftir sita vit her í Leirvík og spyrja, hvat við Leirvík?

Vit leirvíkingar hava funnið okkum í, at Norðoyatunnilin verður gjørdur, uttan ein loysn um farleiðina um Leirvík, er funnin. Vit hava alla tíðina havt tað álit á okkara Løgting, at tað ikki fór at kroysta eina vánaliga loysn niður yvir okkum her í Leirvík

Leirvíkar kommuna varð biðin um at meta um eina møguliga farleið, og niðurstøðan hjá kommununi var, og er, at ein tunnil um Leirvík er tann besta loysnin fyri Leirvík. Tunnilin um Leirvík er ikki ein loysn, Leirvíkar Kommuna sjálv er komin við. Tunnilin var ein av loysnunum, landsmyndugleikanir løgdu fyri Leirvíkar Kommunu at velja millum. Síðani bleiv hesin tunnil staðfestur við lóg.

Vit her í Leirvík hava liva í tí góðu trúgv, at hendan niðurstøðan bleiv tikin til eftirtektar av Løgtinginum og Vinnumálaráðnum. Men so skuldi ikki verða.

Í fjølmiðlunum í síðstu viku var gjørt greitt, at Leirvíks bygd skal "ofrast", so uml. 75 mió. kunnu nýtast til umvælingar av Løgtingshúsinum, uml. 400 mió. til eina nýggja suðuroyarferju, uml. 290 mió. til ein nýggjan skúladepil í Tórshavn, og enntá uml. 75 mió. kr. til eina nýggja innkoyring til Tórshavn, sum longu hevur tað besta vegakervið í landinum. Soleiðis kundi eg hildið áfram.

Lítið mann vera at ivast í, hvør tað er, sum leggur linjurnar hjá Vinnumálaráðnum. Sjálvandi hevur landsstýrismaðurin sína ábyrgd, men mín fatan er, at tað eru aðrir landsstýrismenn og løgtingsmenn, ið avgerða, hvat er best fyri landið, tá hugsa verður um samferðslukervið.

Vit frættu fyri stuttari tíð síðani, at alt vegakervið til Viðareiðis skal endurskoðast. Byrjast skal við einum nýggjum tunnli til bygdina, og so skal vegurin endurskoðast. Hesin tunnil hevur ikki verði høgt raðfestur fyrr, men nú er vend komin í. Skuldi eg hættað mær at gitt hví, so er mítt besta boð, at ávísir tingmenn nú ætla at røkja sítt egna valdømi eitt sindur betur. So mugu vit onnur bert finna okkum í vánaligum loysnum.

Tað er enntá játtaður peningur til kanningar av einum undirsjóvartunnli um Skopunarfjør, við tí fyri eyga, at annar tunnil skal gerast til Suðuroy. Hetta verður gjørt, sjálvt um nýggi Smyril, ið alt í alt kostar uml. 400 mió. ikki ein gongd er komin í sigling enn.

Eisini skal verða mint á, at tað bert eru nøkur heilt fá ár síðani sandingar fingur nýggja ferju.

Vit her í Leirvík hava ongatíð kravt nakað av landsmyndugleikunum, og hava ongatíð fingið nakað heldur. Ein ferjulega var kroyst niður á okkum í 80'unum, og hana gjalda vit fyri enn. Tað einasta við vilja í dag, er at heita á Løgtingið um ikki at oyðileggja Leirvíks bygd, við at leggja ein veg ígjøgnum besta byggilendi í Leirvík, ella við at leiða bilar í hópatal gjøgnum bygdina. Rambøll Nyvig metir at, alt frá 3.000 til 4.000 bilar um døgnið er sannlíkt (www.lerivik.fo).

**Er ein tunnil um Leirvík eitt órímuligt krav?**
Meirkostnaðurin av ein tunnli í mun til áðurnevnda veg er einans uml. 30 mió. kr. Í tí stóra og heila, so svara 30 mió. kr. til uml. 0,8% av landsins fíggjarlóg fyri 2005.

0,8% av uml. 3,8 mia. kr. av eini fíggjarlóg hjá landinum, meti eg ikki verða órímuligt fyri eina loysn, sum vil varveita trivnaðin og eitt gott bústaðarmynstur í Leirvík.

Vit her í Leirvík hava ikki biði um Norðoyatunnilin, og hava vit tí sera torført við at skilja hví vit skulu svíða fyri, at norðoyingar skulu hava lættari við at koma inn á meginlandi.

Eisini vil eg vísa á, at tolir fíggjarlógin ikki eina so lítla broyting, so hevur Fíggamálráðið og Løgtingið ikki gjørt sítt arbeiði til lítar.

Til seinast vil eg bert vísa á, at um Løgtingið ikki metir tað verða pláss fyri eini broyting uppá 0,8% í fíggjarlógini, so hava vit her í Leirvík onki ímóti, at Norðoyatunnilin verður útskotin í 1 ella 2 ár, ella til ein loysn er funnin á farleiðini um Leirvík.




**Toyota Avensis 2,0 SOL Sedan** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** SA 626 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 24-02-00 **Seinast sýnaður:** 28-04-04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaðar rútar aftan - 6 Air bags - MVG er í bilinum
**Kr. 147.600,-**



**Toyota Camry 2,2 GL Executive Sedan** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** EV 245 **KM:** 80.000
**Árgangur:** 12-04-00 **Seinast sýnaður:** 25-03-04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Sentral lás - tokulyktir - Hiti í setrunum - Lykta vaskarar - Fløguspælara - leðurróður og gear knøtt - Klima annlegg - 6 Air Bags - Abs bremsur.
**Kr. 158.600,-**



**Skoda Oktavia 1,6 GLX** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** GD 930 **KM:** 61.000
**Árgangur:** 11-05-00 **Seinast sýnaður:** 23-03-04
**Viðmerking:** Sentral lás - AC - El rútar - El spegl.
**Kr. 108.600,-**



**Toyota Camry 2,2 GL AUT Sedan** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** JU 583 **KM:** 87.000
**Árgangur:** 21-12-01 **Seinast sýnaður:** 25-03-04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Sentral lás - Fløguspælara - 4 Air bags - Lykta vaskarar - Cruis Control - Hiti í setrunum - Leðurróður - Toku lyktir.
**Kr. 132.600,-**



**Toyota Avensis 2,0 AUT sol plus** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** UA 748 **KM:** 76.000
**Árgangur:** 08-06-98 **Seinast sýnaður:** 10-10-03
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaðar rútar - Fløguspælara - Leður setur - leður róður og gear knøtt - Klima anlegg - Abs bremsur
**Kr. 138.600,-**



**Mitsubishi Carisima 1,9 DID** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HV 230 **KM:** 51.000
**Árgangur:** 19-03-02 **Seinast sýnaður:** 19-03-02
**Viðmerking:** El rútar Framman - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara - AC - Hiti í setrum - Cruise Control - Rustviðgjórdur 15-03-02
**Kr. 158.600,-**



**Toyota Avensis 1,6 Luna** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** DN 514 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 28-06-01 **Seinast sýnaður:** 01-03-04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara - Alufelgur
**Kr. 128.600,-**



**Toyota Avensis 2,0 D-4D Sol** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HB 585 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 24-02-00 **Seinast sýnaður:** 28-04-04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaðar rútar - Fløguspælara - leður róður og gear knøtt - Klima anlegg
**Kr. 188.600,-**



**Toyota Yaris 1,0 Terra við komfort** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** UG 188 **KM:** 52.000
**Árgangur:** 13-1-00 **Seinast sýnaður:** 18-08-03
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - fjarstýrt sentral lás - Band og Fløguspælara
**Kr. 90.600,-**



**Opel Vectra 1,6** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HL 767 **KM:** 41.000
**Árgangur:** 14-11-01 **Seinast sýnaður:** 14-11-01
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentral lás - Bandspælara
**Kr. 112.600,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F